**Mentamálaráðið**

# Tíðaravmarkað starv sum fyrstilærari í Hósvíkar Skúla

Vegna farloyvi verður starvið sum fyrstilærari í Hósvíkar Skúla lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2009 – 31. juli 2010.

Í Hósvíkar skúla verða 38 næmingar í 7 árgangum. 4 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir fyrstalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Harumframt skal lærarin**
- vera førur fyri at útinna eina mennandi starvsfólkaleiðslu og at tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan
- leggja dent á at menna skúlaskapin í kommununi

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Hósvíkar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 31.2 og 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi 3. juni 2009.**

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn · Telefon 35 50 50
Telefax 35 50 55 · e-postur.: mmr@mmr.fo

**Mentamálaráðið**

# Útoyggjalærarastørv

**Søkt verður eftir útoyggjalærarum til hesar skúlar, Mykines Skúla, Kirkju/Hattarvíkar Skúla og til Skúlan í Koltri**

Størvini verða lýst leys til setanar frá 1. august 2009.

**Um størvini**
Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur alla undirvísingina í skúlanum. Størvini eru fulltíðarstørv.

**Søkt verður eftir útoyggjalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- skal hava regluligt samstarv við ein størri skúla í kommununi ella í økjunum

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Um eingin lærari søkir starvið, verður umsøkjari, ið ikki hevur fólkaskúlalæraraútbúgving, settur í starvið.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Størvini eru flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við prógvi, C. V. o.ø skulu verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi 3. juni 2009.**

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um størvini, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn · Telefon 35 50 50
Telefax 35 50 55 · e-postur.: mmr@mmr.fo

**Mentamálaráðið**

# Tíðaravmarkað størv sum einalærarar í Tjørnuvík og í Fámjin

Vegna farloyvi verða størvini sum einalærari í Tjørnuvíkar skúla og í Fámjins skúla lýst leys til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2009 – 31. juli 2010.

**Um størvini**
Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur meginpartin av undirvísingini í skúlanum. Størvini eru fulltíðarstørv og tíðaravmarkað skúlaárið 2009/10.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Størvini eru flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi 3 juni 2009.**

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um størvini, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn · Telefon 35 50 50
Telefax 35 50 55 · e-postur.: mmr@mmr.fo

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við